**UTTAN ÚR HEIMI**

## Burturkast í trolið

Donsku fiskimenninir, sum royna við trolið í Norðsjónum, fáa nógv annað enn fisk í trolið.

Tað seinasta hálva árið hava tíggju trolarar úr Hvide Sande á vesturjútsku strondini verið við í einari verkætlan, sum eitur Save the North Sea. Sum lið í verkætlanini hava teir tikið alt burturkastið, sum kemur í trolið, við sær til lands, og higartil snýr tað seg um næstan 83 tons. Endamálið við verkætlanini er at fáa staðfest, hvat tað er fyri burturkast, sum verður tveitt í havið, og at virka fyri, at skip og boripallar ikki nýta Norðsjógvin sum køst.

Havnarmeistarin í Hvide sande, Erik Clausen, sigur við Ritzau, at okkurt av skipunum hevði tvey tons av burturkasti og fýra tons av fiski á onkrum túri. Í meðal hava skipini fingið ímillum 10 og 14 tons av burturkasti í trolið um mánaðin, og tað heldur havnarmeistarin vera í meira lagi.

## Tóku myndirnar til stuttleika

Lynndie England, sum er ímillum teir amerikonsku hermenninar, sum eru skuldsettir fyri at hava farið illa við irakskum fangum, sigur sambært New York Times, at tey tóku myndirnar av fangunum til stuttleika.

Blaðið hevur fingið fatur á tí, sum kom fram, tá Lynndie England bleiv avhoyrd. Har skal hon hava sagt, at hon hevði verið við til traðka á irakskar fangar og at hava teir í tjóðri. Ein mynd av Lynndie England við einum fanga í tjóðri er farin um allan heimin, og sambært New York Times skal hon hava greitt frá, at tey ofta høvdu fangarnar í tjóðri einar fimm ella seks tímar, og at fangarnir fingu boð um at grulva við tjóðrinum um hálsin. Eisini skal hon hava sagt, at ein av fangavørðunum sparkaði ein irakskan fanga so illa, at hann fekk opin sár.

Sambært blaðnum skal Lynndie England hava greitt frá, at tað var rættiliga vanligt at taka myndir av fangum, sum fingu ringa viðferð.

## Systirin álopin

Sunnunáttina brutu ókendir menn inn í húsini hjá teirri 58 ára gomlu Gordanu Djindjic-Filipovic í býnum Valgeva sunnan fyri serbiska høvuðsstaðin Beograd. Ein av monnunum spoytaði eitt ella annað evni inn í annan armin á henni, áðrenn hann og hinir tóku til rýmingar.

Gordana Djindjic-Filipovic er systir fyrrverandi serbiska forsætisráðharran Zoran Djindjic, sum varð myrdur á Beograd fyri einum ári síðani, og serbiska løgreglan metir álopið sunnunáttina sum eina morðroynd.

Óváttað tíðindi úr Serbia siga, at menninir, sum brutu inn til Gordanu Djindjic-Filipovic sunnunáttina, hóttu við at myrða hana og alt húski hennara, verður Milorad Lukovic dømdur fyri at hava lagt morðið á bróður hennara til rættis. Milorad Lukovic gav her fyri stuttum yvir til løgregluna, sum vil vera við, at tað var hann, sum skipaði fyri morðinum á forsætisráðharran. Samstundis er tað fyri teimum flestu ein gáta, hví hann gav seg yvir.

## Rennandi varaborgarstjóri

Varaborgarstjórin í danska býnum Ølstykke, tann 65 ára gamli Erhard Filtenborg, hevur sum tann fyrsti danin nakrantíð runnið marathon-teinin 300 ferðir, skrivar blaðið Frederiksborg Amts Aviv.

Sunnudagin tók varaborgarstjórin lut í tí 25. Copenhagen Marathon, og hann hevur runnið teir 42,195 kilometrarnar í 27 ymsum londum. Higartil í ár hevur hann verið við í 14 marathon-renningum, og hann hevur nú runnið einar 12.700 kilometrar, síðani hann byrjaði.

Við Frederiksborg Amts Avis sigur tann rennandi varaborgarstjórin, at sjálvandi hevur hann fingið drúgvar royndir á økinum, men at hann framvegis tekur tað sum eina stóra uppgávu at fullføra teinin hvørja ferð.

# Hann góðkendi ágangin ímóti fangunum

**Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, góðkendi, at hermenninir í Irak kundu gera seg inn á teir iraksku fangarnar fyri at fáa teir á glið. Ráðstova hansara avsannar tíðindini**



FANGAVIÐFERÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, og ein av hansara næstu embætismonnum tóku undir við, at fangavørðarnir í Abu Ghraib-fongslinum í Bagdad kundu nýta likamligan og kynsligan ágang ímóti teimum iraksku fangunum fyri at fáa teir at svara spurningum.

Tað skrivar amerikanska tíðarritið The New Yorker. Blaðið hevur tosað við týðandi fólk í amerikonsku fregnartænastunum, sum hava havt samband við avhoyringarnar av teimum iraksku fangunum.

Verjumálaráðið Pentagon avsannar tíðindini í tíðarritinum. Talsmaðurin, Lawrence Di Rita, segði í gjár, at eingin í verjumálaráðnum hevur givið fangavørðunum loyvi til at nýta slíka framferð.

The New Yorker skrivaði í gjár, at Donald Rumsfeld og varaverjumálaráðharrin Stephen Cambone gjørdu av at nýta somu framferð ímóti fangunum í Irak sum ímóti fangunum í Guantanamo í Kuba. Ein liður í hesum var at taka myndir av fangunum, meðan teir vóru naknir. Samstundis skuldu fangarnir fáa at vita, at svaraðu teir ikki spurningunum frá fangavørðunum, fóru amerikanararnir at vísa skyldfólkum teirra myndirnar.

### Politikarar ivast

Stjórnin hjá George W. Bush, forseta hevur higartil hildið fast um, at eingin í herleiðsluni visti um tað, sum fór fram í fongslinum í Irak, men bæði demokratiskir og republikanskir politikarar hava sagt seg ivast í hesum.

– Tey sjey skuldsettu fangavørðarnir vistu ikki, hvussu teir skuldu míkja fangarnar. Eg havi eingi prógv, men eg ivist ikki í, at onkur annar var uppi í hesum, segði republikanski senatorurin Susan Collins sunnudagin.

Fleiri hava kravt, at Donald Rumsfeld skal fara frá, men hann sigur nei. Bush, forseti, hevur eisini víst øllum skuldsetingum ímóti verjumálaráðharranum aftur.

Mannarættindafelagsskapir hava lagt stjórnina í Washington undir at dylja sannleikan. Teir vísa á, at stjórnin longu í 2002 fekk at vita, at fangar vórðu illa viðfarnir í fangalegum, sum CIA hevði uppsýn við. Nakrar mánaðir seinni segði Bush, at USA fór at forða øllum ágangi ímóti fangum, men sambært mannarættindafelagsskapunum vóru hetta tóm orð, tí sambært Reyða Krossi og øðrum felagsskapum hildu amerikanararnir fram við at bróta Geneve-sáttmálan um viðferð av krígsfangum.

# Í lagi at bróta húsini niður

**Sambært ísraelska hægstarætti hevur ísraelski herurin loyvi til at bróta hús hjá palestinum í Gaza-geiranum niður. Mong eru vorðin heimleys**

ÍSRAEL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Leygardagin staðfesti ein undirrættur í Ísrael, at ísraelski herurin hevur ikki loyvi til at bróta hús hjá palestinum í Gaza-geiranum niður, men sunnudagin broytti hægstitættur avgerðina.

Síðani fimm ísraelskir hermenn doyðu í samanbresti við palestinar seinasta mikudag, hevur ísraelski herurin oyðilagt húsini hjá nógvum palestinum í Gaza. Sambært tíðindastovunum vórðu 88 íbúðarhús javnað við jørðina fríggjadagin, soleiðis at meiri enn túsund fólk gjørdust heimleys. Hildið verður, at umleið 11.000 palestinar eru vorðnir heimleysir, síðani tann palestinski uppreisturin byrjaði í september í 2000.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, sigur, at USA er ímóti tí, sum Ísrael ger. Powell, sum var í Jordan sunnudagin, segði á einum tíðindafundi, at amerikanska stjórnin vil hava Ísrael at gevast við at bróta húsini hjá palestinunum í Gaza niður.


FØROYA HANDILSSKÚLI

## Lýsing eftir tímalærarum
**til hægri útbúgvingar**

Um nóg stór undirtøka verður til niðanfyrstandandi lærugreinir, verða hesi tímalærarastørv leys at søkja:

**HD 1. partur: skúlaárið 2004/05**

Søkt verður eftir tímalærarum í:
- Vinnubúskapi (120 t)
- Hagfrøði (90 t)
- EDV og búskapur (30 t)

*Setan fer fram í samráð við Handilsháskúlan í Århus.*

**Fortreytir:**
Viðkomandi kandidat-útbúgving.

**AkademiMerkonom: Heystið 2004**

Søkt verður eftir tímalærarum í:
- Hagfrøði *(Statistik)* (75 t)
- Human Resource Management (75 t)
- Altjóða Samskifti *(Global Kommunikatión)* (75 t)

**Fortreytir:**
Viðkomandi kandidat-útbúgving, pedagogikum og minst 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir. Um umsøkjari ikki hevur pedagogikum og ongar undirvísingarroyndir hevur, er møguligt hjá skúlanum at veita pedagogiskt innleiðsluskeið.

**Teldustøðinga-útbúgvingin: Heystið 2004**

Søkt verður eftir tímalærarum í:
- Systemkonstruktiónsprosjekt (500 AT)
- Systemmenning (200 AT)

**Fortreytir:**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi kandidat-útbúgving innan KT-økið.

**Umsóknarfreistin er 18. juni 2004**
Umsókn skal stílast til Føroya Handilsskúla í Havn, att: Elsa Maria Holm Olsen, deildarstjóra.

Umsøkjarir kunnu fáa meiri at vita um setanarviðurskifti o.a. við at venda sær til Elsu Mariu Holm Olsen, deildarstjóra
Lýsingar av lærugreinunum liggja á heimasíðu skúlans.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður · Tel 444900 · Telefax 444901
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**



FØROYA HANDILSSKÚLI

## HD - 1.partur
**í Føroyum**

Treytað av nóg stórari luttøku verður í heyst aftur farið undir HD 1.part. HD 1. partur er ein grundleggjandi ástøðilig innføring í lærugreinirnar Vinnubúskapur, Samfelagsbúskapur, Hagfrøði, Vinnulívsrættur, Vinnubúskaparligur háttur og KT & búskapur.

**Full HD-útbúgving ella HD staklærugreinir:**
Møguleiki er at lesa HD 1. part sum eina samlaða útbúgving við at fylgja øllum lærugreinunum ella at taka stakar lærugreinir eftir tørvi.

**Skúlaárið 2004/2005**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Vinnubúskapur: | Mánadag | Kl. 16.00 | 19.10 |
| Hagfrøði: | Týsdag | Kl. 16.00 | 17.30 |
| KT og búskapur: | Hósdagur: | Kl. 16.00 | 17.30 |

**Undirvísingin byrjar í viku 36. Próvtøkan verður í mai/juni.**

**Skúlaárið 2005/2006**
Samfelagsbúskapur
Vinnulívsrættur
Vinnubúskaparligur háttur

**Fortreyt:**
Miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving. Eisini skal tann, sum ætlar sær at lesa HD 1. part hava prógv í støddfrøði á B stigi.

**Kostnaður:**
Nærri upplýsingar um kostnað fyri lærugreinirnar liggja á innskrivingarseðlinum á heimasíðu skúlans.

**Videoráðstevna NÝTT NÝTT NÝTT**
Arbeitt verður við møguleikanum at gera tað møguligt fyri suðuroyingum og eysturoyingum/norðoyingum at fylgja HD undirvís-ingini um videoráðstevnu. Gerst videoráðstevnumøguleikin veruleiki, verður lýst nærri.

**Umsóknarfreistin er 7. juni 2004**
Umsóknir skulu sendast til Føroya Handilsskúla í Havn, att.: Elsa Maria Holm Olsen, deildarstjóra.

Innskrivingarseðil og meiri kunning um útbúgvingina finnur tú á heimsíðu skúlans. Eisini er møguligt at fáa vegleiðing við at ringja til lestrarvegleiðarar skúlans:
Birgir Mortensen, Tórshavn, og Karl Olsen, Kambsdalur.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður · Tel 444900 · Telefax 444901
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**



GEVIÐ BLÓÐ

## Eiðis Læknadømis Sjúkrakassi

hevur stongt frá 24. mai 2004 til 3. juni 2004.

**Eiðis Læknadømis Sjúkrakassi**
FO-430 Hvalvík



## Sjálvuppgávur og roknskapir 2003

**Innlatingarfreist**
Feløg, felagsskapir deyðsbúgv v.m. - við roknskaparskyldu - skulu lata inn sjálvuppgávur og roknskapir viðvíkjandi árinum 2003 í seinasta lagi

**1. juni 2004**

um roknskaparskeiðið endar í ella fellur saman við álmannakkaárinum 2003.

**Sí eisini heimasíðu okkara www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Argir, 17. mai 2004